# Lekir fólk við “piskesmæld”

**Seinastu dagarnar hevur danski læknin, Øivind K. Mathiasen, vitjað í Føroyum. Hann gevur viðgerðir fyri tað, sum á føroyskum verður kallað koyrilsbrestur. Nógv líða øgiligt av hesum skaða, sum flestu hava fingið í ferðsluvanlukku. Men tey verða ikki tikin fyri fult og verða ofta løgd undir at hava ringar nervar**

HEILSA OG VIÐGERÐ
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Fólk ringdu úr eyst og vest, tá tey hoyrdu um danka læknan, Øivind K. Mathiasen, sum gevur viðgerðir fyri koyrilsbrest - ella piskesmæld, sum tað eitur á donskum*
*(Myndir: Jens Kristian Vang)*



Tað var sum á døgum Jesusar. Fólk flokkaðust um danska læknan, sum tey høvdu hoyrt, kundi sleppa teimum av við líðingarnar, eingin fyrr hevði tikið fyri fult.

Hetta var tó eingin Jesus, men bert ein vanligur lækni, sum hevur nýtt nógv ár av sínum lívi at granska í hesum skaða. Eftir mong ár er hann nú førur fyri at viðgera og í allarflestu førum lekja fólk, ið líða av “piskesmæld”.

Flestu, sum líða av koyrilsbresti, hava fingið hann í ferðsluóhappi, men eisini stoytir, eitt nú orsaka av falli, kunnu elva til henda skaða.

Plágurnar, sum standast av koyrilsbresti, eru nógvar, og í ringasta føri verða fólk óarbeiðsfør.

Ógvuslig høvuðpína og støðug møði eru mest eyðkendu trupulleikarnir, sum fólk við koyrilsbresti hava at dragast við.

Tað ringasta hjá hesum sjúklingum er, at fá hava tikið tey fyri fult. Tey verða skírd bæði líkt og ólíkt - løt, sjúkliga sjúkurødd ella grenj.

### Telefonstormur

Ein av teimum, sum hevur drigist við ógvusligar plágur orsaka av koyrilsbresti, er Leivur Sørensen í Syðrugøtu.

Av tilvild hoyrdi hann um danska læknan og leitaði sær hjálp hjá honum. Eftir fáar viðgerðir, var týðiligur bati hjá Leivi, sum hevði verið sjúkur í 25 ár.

Leivur setti sær fyri at royna at fáa læknan til Føroya, og í seinastu viku kom Øivind K. Mathiasen til higar.

Ein vinmaður hjá Leivi keypti ferðaseðilin, og onnur lótu summarhús síni ókeypis, so læknin og kona hansara kundu vera fyri seg sjálvi á føroyaferðini.

Fríggjakvøldið sendi SvF ein stubba um viðgerðina, sum danski læknin gevur. Síðani tá hevur verið telefonstormur hjá Leivi Sørensen og Jóhan Beder, sum eisini hevur leitað sær viðgerð í Danmark hjá danska piskesmældslæknanum, sum Øivind K. Mathiasen verður kallaður niðri.

### Kragi fyribyrgir

Ein stór avstralsk kanning vísir, at fólk, ið nýta kraga eftir eitt ferðsluóhapp, oftast sleppa undan skaða í nakkanum.

Har yviri skal ein ikki rokna við, at tryggingin tekur við, um ikki kragi verður nýttur eftir eitt ferðsluóhapp.

Øivind K. Mathiasen sigur, at hetta kann samanberast við, tá tú keikir fótin. Verður fóturin ikki umbundin og stuðlaður, er vandi fyri varandi meini.

Júst tað sama er galdandi, tá høvdið verður slongt harðliga aftur og fram. Tá er neyðugt, at hálsurin verður hildin í friði og stuðlaður við kraga nakrar dagar.

Hetta er ein einføld viðgerð, men hon kann sleppa fólki undan áralongum líðingum og óarbeiðsføri.

### Ikki uppfunnið nakað nýtt

Øivind K. Mathiansen er útbúgvin lækni. Hann sigur, at hann hevur ikki funnið uppá nakað nýtt, men bert granskað í tí tilfari, sum fanst frammanundan.

– Alt byrjaði, tá eg starvaðist á pínudeildini á intensivdeildini í Esbjerg. Tað vóru so nógv, eg ikki fekk hjálpt við tí viðgerð, eg kundi geva, sigur hann.

Eftir áheitan byrjaði hann at hyggja nærri at ymiskum alternativum viðgerðaháttum. Og tá hann hevði tikið øll skeið, ið funnust í danska ríkinum, fór hann uttanlands at læra meiri.

Í læknaliga fakliteraturinum stendur, at varandi koyrilsbrestur er ólekjandi, men hetta er ikki so.

– Mínar royndir eru, at øll, sum líða av “piskesmæld”, kunnu hjálpast og í nógvum førum lekjast fullkomiliga, sigur danski læknin.

Ein av trupulleikunum við koyrilsbresti er, at røntgenmyndir og skanningar sjáldan avdúka skaðan.

Hetta kemst av, at broytingar í bleytholdinum ikki kunnu mátast. Tað ber bara til at føla tær við fingrunum, og til tað krevst venjing.

Tað er sum at spæla á klaver ella at koyra bil. Tú kanst ikki lesa teg til tað.

### Børn verða svikin

Øivind K. Mathiasen er sera eymur, tá tað snýr seg um børn við koyrilsbresti.

Børn smokka burtur í millum og verða alt ov ofta hildin burtur við pínutablettum.

Tey hava trupult við at seta orð á, hvat teimum bagir. Í staðin leika tey í fyri at avleiða tankarnar frá pínuni. Tað eru allar orsøkir at taka børnini í álvara, tí ein hálendsk kanning vísir, at “piskesmæld” hjá børnum er ein trupulleiki, bæði í skúlanum og sosialt.

Sjúklingar við koyrilsbresti verða ongantíð viðgjørdir beint eftir óhappið. Tað er umráðandi at lata tíðina ganga. Um pínan fer av sær sjálvum, og eingi sjúkueyðkenni eru, er eingin orsøk at geva viðgerð.

### Flestu gerast frísk

Er koyrilsbresturin varandi, er alneyðugt at koma í viðgerð, og tey flestu gerast heilt frísk.

Ikki allir sjúklingar hava eins nógvar viðgerðir fyri neyðini. Summi verða frísk eftir heilt fáum viðgerðum hjá Øivindi.

Nógv fólk fara ígjøgnum langar viðgerðir hjá fysioterapeutum. Summi við góðum úrslitum – onnur fáa ikki hjálp.

Fysioterapeutarnir í dag eru væl útbúnir, men tey hava eitt øki, sum tey mugu halda seg innanfyri.

Um skaðin sitir tætt at hámønuni, skulu tey steðga viðgerðini har.

– Sum lækni havi eg ein annan førleika og heimild, og ta ábyrgdina

skal eg tora at átaka mær, sigur Øivind.

Dagarnar í Føroyum hevur Øivind viðgjørt hópin av sjúklingum. Minst 50 aftrat hava ringt og ynskja at koma í viðgerð, sigur Leivur Sørensen við Sosialin.

Nú verður arbeitt við at fáa Øivind aftur til Føroya. Privatpersónar hava tosað um at keypa hann heimaftur, so tey kunnu verða viðgjørd her heima, í staðin fyri at noyðast longu ferðina til Danmarkar.



*Viðgerðin er pínufull, men munur merkist beinanvegin. Dia Jacobsen úr Fuglafirði hevur í mong ár havt trupulleikar av koyrilsbresti, hann fekk í einum ferðsluóhappi*





## Letur USA fáa upplýsingar

Finska flogfelagið Finnair hevur gjørt av at lata amerikonsku myndugleikarnar fáa upplýsingar um tey, sum flúgva við flogførunum hjá felagnum.

Avtalan við amerikanararnar kemur í gildi nú mánadagin. Tá kunnu amerikonsku myndugleikarnir fáa at vita nøvnini á teimum, sum flúgva við flogførunum hjá Finnair, nummarið á kredittkorti teirra, og teir kunnu eisini fáa at vita, um ferðafólkini hava havt nøkur serlig ynski í sambandi við ferðina.

Leiðslan í Finnair sigur, at hon hevði einki í at velja enn at slaka fyri amerikanska kravinum. Ferðafólkini fáa at vita, at amerikanararnir fáa upplýsingarnar um tey, og vilja tey ikki góðtaka tað, fáa tey stutt sagt ongan ferðaseðil. USA hevur biðið fleiri onnur evropeisk flogfeløg um somu skipan, og tað er eisini líkt til, at tað verður so. Endamálið hjá amerikanarunum er at forða yvirgangsmonnum at koma við flogfari til USA.

## Alifelag í rættin

Løgreglan í Tromsø í Noregi fer fyrsta dagin í rættin við einum alifelag, sum er ákært fyri at hava koyrt nógvan deyðan og ILA-smittaðan laks á sjógv.

Tað var í oktober í fjør, at fiskimenn í Rotsund komu eftir, at alifelagið Nordreisa Laks hevði koyrt nógvan deyðan og ILA-smittaðan laks á sjógv. Myndugleikarnir komu upp í málið, og dagligi leiðarin hjá felagnum varð varðhaldsfongslaður í átta dagar. Samstundis varð ruddað upp í felagnum við tí úrsliti, at felagið hevði 27 milliónir krónur í halli, tá avtornaði, og í dag er tað hótt av húsagangi, skrivar norðurnorska blaðið Nordlys.

Løgreglan hevur kannað málið síðani seinasta heyst og er nú komin so langt við tí, at tað fer í rætin í næstum.

## Illir sjómenn

Sjómannadeildin hjá danska fakfelagnum SiD er í øðini um, at donsku farmaskipareiðaríini nýta nógvar útlendskar sjómenn sum bíliga arbeiðsmegi umborð á farmaskipunum.

SiD finst at reiðaríunum, sum verða løgd undir at skráseta skipini í donsku altjóða skipaskrásetingini DIS við tí eittans endamáli at sleppa at nýta teir útlendsku sjómenninar. Felagið sigur, at hetta hevur kostað nógv donsk arbeiðspláss. Eisini finst SiD at umstøðunum hjá útlendsku sjómonnunum. Víst verður á, at seinastu fimm árini eru 16 sjómenn deyðir av vanlukkum umborð á farmaskipunum, og at tað er lutfalsliga nógv meiri enn á arbeiðsplássum uppi á landi. Tí fer SiD nú undir eina lýsingaherferð ímóti reiðarínum, sum nýta bíliga útlendska arbeiðsmegi.

Danska reiðarafelagið er alt annað enn fegið um átakið hjá sjómonnunum. Felagið sigur framferðina vera bæði ósømiliga og óhepna.

## Kann raka Jørðina

Amerikanskir rúmdargranskarar siga seg hava funnið ein rúmdarstein, sum kann raka Jørðina um góð tíggju ár.

Vil illa til, kann rúmdarsteinurin raka Jørðina tann 21. mars í 2014. Men møguleikin fyri, at tað verður so, er ikki serliga stórur, tí rúmdargranskararnir hava roknað út, at møguleikin er 1:909.000.

Sambært amerikonsku granskarunum er rúmdarsteinurin umleið ein kilometur í tvørmát ella á leið líka stórur sum tann, ið sambært vísindini rakti Jørðina fyri 65 milliónum árum síðani. Tann steinurin verður sagdur at hava havt oyðandi ávirkan á viðurskiftini á Jørðini og skal millum annað hava verið orsøkin til, at teir viðgitnu dinosaurarnir doyðu út.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# 100 deyðadómar í USA broyttir til fongsul

**Ein samveldisdómstólur í USA hevur gjørt av, at hundrað deyðadømdir fangar skulu ikki avrættast, men hava lívlanga fongsulsrevsing í staðin fyri.**

DEYÐAREVSING
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Dómstólurin tók avgerðina við støði í einum úrskurði hjá amerikanska hægstarætti um, at tað eru einans nevningar og ikki dómarar, sum kunnu gera av, um fólk, sum eru dømd fyri álvarssom lógarbrot, kunnu takast av døgum.

Avgerðin hjá samveldisdómstólinum umfatar statirnar Arizona, Montana og Idaho, tí har hava myndugleikarnir higartil latið dómarar gjørt av, um fólk skulu avrættast. Av teimum ellivu nevningunum atkvøddu átta fyri at broyta deyðadómarnar til lívlangt fongsul.

Ríkisákærin í Arizona er ikki nøgdur við avgerðina hjá dómstólinum, tí hann heldur ikki, at úrskurðurin hjá hægstarætti kann hava afturvirkandi gildi. Tí bendir nógv á, at málið endar í hægstarætti eina ferð afturat.

Hóast teir fangar fyribils eru slopnir undan deyðarevsing, eru nógvir eftir. Mett verður, at 3.500 fangar í amerikonskum fongslum bíða eftir at verða avrættaðir.

# Enn ein avbjóðari



*Her boðar demokratiski senatorurin John Kerry frá, at hann ætlar sær at bjóða George W. Bush, forseta av á forsetavalinum næsta ár. Men fyrst skal hann vinna dystin um at gerast valevni hjá demokratunum. Fyribils eru mótstøðumenn hansara Howard Dean, guvernørur og Joseph Lieberman, senatorur.*

# Kirkjan í Argentina góðtók píning hjá hernaðarstýrinum

**Katólska kirkjan í Argentina hevur øll árini avsannað, at hon vendi tað blinda eygað til framferðina hjá hernaðarstýrinum í sjeyti- og áttatiárunum. Nú vísir tað seg, at kirkjan beinleiðis góðtók, at politiskir andstøðingar vórðu píndir.**

ARGENTINA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tað er fyrrverandi einaræðisharrin, Reynaldo Bignone, sum nú avdúkar tann veruliga leiklutin hjá katólsku kirkjuni undir hernaðarstýrinum í Argentina í sjeyti- og áttatiárunum.

Andstøðufólk hjá hernaðarstýrinum hava alla tíðina sagt, at kirkjan vendi tað blinda eygað til framferðina hjá stýrinum, men tað hava teir kirkjuligu leiðararnir avsannað. Men sambært Reynaldo Bignone, sum sjálvur er ákærdur fyri morð og burturflytingar, visti kirkjan alt.

– Vit fingu góðkenning frá biskuppunum til at nýta píning undir ávísum umstøðum, sigur fyrrverandi generalurin í samrøðu við argentinska blaðið Pagina12. Samstundis viðgongur hann, at “minst” 8.000 politiskir andstøðingar vórðu rændir og myrdir undir hernaðarstýrinum. Sjálv vil andstøðan vera við, at talið var um 30.000.

Men generalurin hartar ikki bert sínar egnu. Frakland hevur kravt at fáa argentinska herflotayvirmannin Alfredo Astiz útflýggjaðan, tí hann myrdi tvær franskar nunnur, men við Pagina12 sigur Bignone, at tað vóru franskir hernaðarráðgevar, sum lærdu argentinska hernaðarstýrið, hvussu tað skuldi ræna og beina fyri sínum mótstøðumonnum.

Reynaldo Bignone, sum nú er 84 ára gamal, tók við sum leiðari í hernaðarstýrinum eftir generalin Leopoldo Galtieri, sum noyddist frá aftan á kríggið við Bretland um Falklandsoyggjarnar.